# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*Eg eiti Dávid og eri føddur 24. juni 2006 í suður Korea. Mamma mín og pápi mín fingu meg 2. mai 2007, tey eita Jóna og Dánjal Jóhan Thomsen og vit búgva í Havn.*

22 mai fingu Jóna Hansen og Jesper D. Christoffersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3550 gr.

28. mai fingu Jonna Berg og Jens O. Erlingsson, Hvalba, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2710 gr.

30. mai fingu Maria Smith og Uni K. Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

30. mai fingu Marjun og Høgni Sloan Justesen, Kvívík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4050 gr.

30. mei fingu Súsanna Bæk Troelsen og Henning Troelsen, Fredericia, eina dóttur. Hon vigaði 3580 g og var 53 cm.

31. mai fingu Jona Madsen og Marius Joensen, Norðskála, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr.

31. mai fingu Tórun við Óságarð og Tórarin Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

31. mai fingu Anna Maria og Jóannes M. Hansen, Argjum, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

31. mai fingu Klara og Petur Martin Solmunde, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

1. juni fingu Maj-Britt Hansen og Ólavur Weihe, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

1. juni fingu Elin Mouritsen og Jens Martin Lamhauge, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3800 gr.

2. juni fingu Pernille og Signar Heinesen, Signabø, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

3. juni fingu Gunnvør Joensen og Magnus Norðberg á Fosterhill hospital í Aberdeen, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3770 gr.

4. juni fingu Beinta og Magni Simonsen, Vatnsoyrum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2850 gr.

5. juni fingu Erla L. og Dánjal í Húsinum, Kollafirði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4750 gr.

# Hans Vilhelm 60 ár

Leygardagin 9. juni verður Hans Vilhelm Danielsen 60 ár. Hans Vilhelm er ættaður av Húsum.

Foreldur hansara vóru Annia og Dánjal Danielsen. Annia var fyrst gift við Sigmundi Niclassen úr Kunoy. Men hann doyði heilt ungur av tuberklum, og Annia sat einkja bert 20 ára gomul við tveimum børnum, Hannefiu og Ingvard. Annia giftust aftur við Dánjali nøkur ár seinni, og tey fingu trý børn, Petur, Sigrun og Hans Vilhelm, sum er yngstur.

Í 1962 fluttu tey til av Húsum til Klaksvíkar. Sum ungur fór Hans Vilhelm í snikkaralæru, og hann arbeiddi í nøkur ár hjá Tofta Karl og Dia í Kunoy. Men hugurin hjá Hans Vilhelm stóð til sjógvin. Hann fór til skips, og størsta partin av sínum arbeiðslívi hevur hann siglt við langfaratrolarum.

Hann hevur verið við Enniberg síðan seinast í 80-unum. Tøl eru sum vísa, at hann síðan 1992 hevur verið 47 túrur við, og dagatalið fyri hesar túrar hevur verið ikki minni enn 3.000. So tað kann sanniliga sigast, at Hans Vilhelm hevur gjørt sítt fyri samfelagið.

Sum onkrir aðrir gjørdist Hans Vilhelm í fyrsta umfari gamal drongur. Hann fann nevniliga ikki ta røttu, fyrr enn hann hitti Elmu Berg, og tey giftust í 1987, tá hann var 40 ára gamal, og tey búsettust í Havn. Elma átti dóttrina Margit, sum fekk ein frálíkan pápa í Hans Vilhelm og seinni ikki minni frálíkan abba til son hennara, sum eitur Dánjal, uppkallaður eftir pápa Hans Vilhelm.

Elma er dóttir Mariu og Leif Berg í Søldarfirði. Leif er ein partur av søguni um Immanuel, sum er umrødd her í blaðnum. Hann var sonur Marius Berg og Elsu Maria, sum var dóttir Sunnevu og Johan David Jacobsen, sum mistu tríggjar synir við Immanuel í 1932. Leif doyði ungur, og Maria giftist aftur við Dáva, sum var systkinabarn Leif. Dávur er eisini partur av hesi søgu, hann misti pápa og tveir pápabeiggjar, og hann eigur sín part av heiðrinum fyri tí, sum er komið fram um hesa vanlukku.



*Hóast Hans Vilhelm var gamal drongur, tá hann giftist, gjørdist hann góður konumaður!*

Sigast kann um Hans Vilhelm og Elmu, at tey eru sera dámlig hjún. Tey eru bæði ættarkær, og tað eigur ikki at verða gloymt, hvussu væl tey tóku sær av mammubeiggja Elmu, Elias, sum var sjúkligur alla sína tíð.

Tey eru mong, sum rokna Hans Vilhelm sum ein góðan vin. Tað, sum eyðkennir Hans Vilhlem, er hansara trúfesti og støðufesti. Hann letur seg ikki taka av fótum av einum og hvørjum orði. Tá hann fer til Klaksvíkar, gongur tíðin at vitja sínar ungdómsvinir úr Klaksvík, og fær hann ikki vitjað teir, ringir hann. Hann er vitandi og áhugaður í samfelagsviðurskifti, og hann lesur nógv, ikki minst bygdasøgu.

Hans Vilhelm hevur fingið tað stuttliga hugskot at halda føðingardagin í heimbygdini Húsum. Hann metir seg nevniliga framvegis at vera húsamann. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum leygardagin frá kl. 15.30. Tað er eingin ivi um, at her munnu mong fara at koma.

Frá okkum skal verða ynskt tykkum báðum hjartaliga tillukku við tøkk fyri vinarlag og trúfesti.

**ó**

# Elsa Carlsen ístaðin fyri Isaksen

Til myndina »Tíðarmynd frá 30-unum« sum var í blaðnum seinasta vikuskifti, hava vit fingið hesar viðmerkingar frá einum lesara:

Vit hava eina upplýsing, um myndina »Tíðarmynd frá 30-unum« í sosialinum nr. 103.

Frá einum lesara hava vit fingið at vita, at konan til høgru á myndini æt Elsa Jacobina Carlsen, fødd 7.11.1854. Hon var yngsta døttur Huldukarl, sum búði í Bringsnagøtu, yvirav Pæsastovu. Hon arbeiddi fiskaarbeiði hjá Evensen.

Í fólkateljingini frá 1911 býr hon í Tróndargøtu, har sum »Skarv« er. Hon búði eisini í Funningstovu. Foreldur hennara vóru Carl Frederik Joen-Petersen, f. 1812 og Susanna Sybilla, fødd Thomasdatter, av Velbastað, vanliga rópt Billa. 1815.



*Meta Danielsen, Ida Didriksen, og Elsa Carlsen*

Tey vóru fýra systkin: Maren Sofie, g.v. Niklas á Kák, Andriassen (mamma Andrias Andriassen), Anne Frederikke (g.v. Vágaheina, Heina Johansen, úr Sandavági), Julianna (doyði ung, um 30 ár, um ár 1880), og Elsa Jacobina Carlsen.

Um onkur veit meira um hesa myndina, ella hevur okkurt at viðmerkja, er viðkomandi vælkomin at kontakta Annfinn Danielsen, sum eigur myndina, á telefon: 224124.